


*Ein trivalig manning. Frá vinstru: Dánjal Norðberg, Eli Smith og Jakku*

nar farnar úr einum borði í hitt. Tær eru farnar í leysari luft, tí tær høvdu ikki skalað maskinuna ella oljurør. Her hevur staðið nógv á.

Eg havi siglt nógv og nógva staðni, heilt frá Grønlandi til Norðurnoreg, men hetta er tað ringasta veður, eg havi verið í. Tá ið umvælingin var liðug, fóru vit aftur til fiskarí. Tað, sum vit fingu mest av við snurriváð undir Íslandi, var hýsa og flatfiskur. Manningin var vanliga 4-5 á hesi veiðu. Snurriváðtíðin vardi ikki leingi, og fleiri høvdu ringt eyga á hendan fiskiskapin, so tað komu fleiri og fleiri avmarkingar, til tað at enda ikki loysti seg longur. Tað varð eisini roynt nokk so nógv við snurriváð undir Føroyum.

Eg fór tá at føra bátin um heystið í Norðsjónum. Men tá ið eg kom heim aftur um veturin bóðu teir meg koma við onkrum trolara og eg fór.

Eg var annars við fleiri trolarum. Eg var viðhvørt við Palla í Sørvági. Hann førdi Havstein hjá Søren Nielsen. Palli gjørdist seinni tollari á flogvøllinum. Hann var ein óføra góður skipari.

## Við Fiskanes

Eg var so heima eina tíð. Men tá var tað, at Hans Pauli og hansara brøður saman við Esmar Fuglø keyptu Fiskanes í 1955. Eg varð biðin við og fór eisini. Tað gekk gott. Tað var sera stórur munur á at vera við Norðbúgvanum og Fiskanes, sum var eitt nógv størri og betri skip. Ein heilt stórur munur var skiftið frá kol til olju í maskinuni. Fiskanes var eitt rættiligt frambrot í endurnýggjanina av okkara fiskiflota. Hann var eisini fyrsta stóra skip, sum varð fíggjað av tí tá nýggja realkreditstovninum.

Tann skjótasti saltfiskatúrur, eg havi gjørt, var fyrsti túrur við Fiskanes. Manningin var stór. So vítt eg minnist, vóru 44 mans við. Eg haldi, at tað vóru 14-15 samdøgur frá tí, vit loystu av Drelnesi á Tvøroyri, har vit tóku salt, inntil vit vóru inni í Føroyingahavnini við fullari last.

Hetta var sera strævið lív. Men eg haldi kortini ikki, at tað var so nógv vaktarbrot. Men hvør maður mátti arbeiða so hart sum hann orkaði.

Í 1956 samtykti løgtingið eina lóg um tveyskiftisvakt, sum merkti, at gangast skuldi seks og seks. Tað skuldi arbeiðast seks tímar, og so skuldi vera frívakt í seks tímar.

Seinna árið, eg var við, var eg 1.stýrimaður. Tá segði Hans Pauli við meg, at tað var keðiligt ikki at kunna bróta vakt. Men tað vísti seg, at nýggja vaktarskipanin riggaði heilt væl. Menn vóru meira úthvíldar til at dríva á, tá ið teir fingu deksvakt, og tað kom tí minsta líka nógv burtur úr. Tá ið tvískiftisvaktin varð lógarásett, vóru nógvir av trolarunum, sum bygdu nýggj manningarkømur, tí teir væntaðu at fáa brúk fyri meira fólki. Men tað vísti seg, at hetta var púra óneyðugt. Við betri hvíldarskipan fekk manningin munandi meira frá hondini.

Eg var tvey ár við Fiskanes. Hetta vóru góð ár, tá ið eg fortjenti væl av pengum.

Eg havi ongantíð verið við slupp, men sum sagt nógv við trolara. Men spurningrin er, um eg hevði dugað at vent mær umborð á einum trolara í dag. Greiðirnar í dag eru nakað heilt annað enn tá. Í dag eru trolini so høg og ganga nógvar favnar uppi í sjónum. Í míni tíð gekk høvuðlínan kanska einar seks føtur, t.v.s. tveir metur, upp frá botninum. Tað hevði ikki fingist nógv við teimum trolunum í dag.



*Hetta eru partaeigararnir, sum vóru í Dagsbrún, sum átti Fiskanes. Aftast f.v. Svenning, Poli, Óli, Hans Pauli.*
*Fremst: Kaj, Esmar Fuglø og Andreas.*
*Jakku hevur siglt saman við teimum øllum uttan Óla, sum ikki varð sjómaður.*

## Hans Pauli væl dámdur

Mær dámdi Hans Paula væl. Hann var ikki sum nógvir aðrir skiparar, at hann legðist á sína vitan um fiskigrunnar. Eg minnist skiparar koma umborð, og Hans Pauli útgreinaði gjølla, hvar hann fekk fisk.

Eina ferð var lítið um Hans Paula. Hann kendi sjálvsagt ikki til annað enn at fáa fisk, tá ið aðrir fingu og kanska meira enn teir. Men eina ferð komu vit út fyri tí, at Fiskanes lá við tómum dekki, meðan hinir trolararnir á somu leið høvdu fult dekk, og tað bara stóð á at reinsa.

Orsøkin var tann, at vit høvdu sprongt trolið tríggjar ferðir hendan morgunin, og harvið var allur fiskurin farin í havið aftur. Tað var lítið um Hans Paula, tá ið eg kom upp á brúnna at loysa hann av. Tá hildu vit, at tað kanska var tað frægasta at toga eitt sindur styttri, og fáa tað upp, sum var í trolinum. Hetta vísti seg eisini at rigga, og aftaná var heldur eingin trupulleiki.

Kaj var eg saman við ein túr. Hetta var aftaná, at Næraberg varð søktur undir krígnum. Tá kom hann umborð á Norðbúgvan tann eina túrin. Eg havi verið saman við øllum Hvannasundsbrøðrunum uttan Óla, sum ikki var sjómaður. Gimme var saman við Mortan, pápanum. Teir hava allir verið óførir menn.

## Rógva út

So fór eg at rógva út. Eg og Gimmi, beiggi mín, høvdu bát saman, tá ið eg byrjaði. Vit keypti ein 10 tons motorbát. Vit fiskaðu so sjáldsama nógv av kalva tað summarið. Árið eftir bleiv lítið til av kalva. Vit góvust og seldu so bátin aftur. Pápi hevði ein motorbát, so róði eg út við pápa eina tíð. Tað gekk bara gott.

Einaferð í 1960-unum helt pápi, at tað varð blivin so nógvur kópur undir Føroyum, og at hesin var til fortreð fyri fiskiskapin. Serliga gjørdi hann seg inn á kalvan, sum var á línuni. Pápi vendi sær til løgtingið, sum samtykti at gevast skuldi premia, sum vist var 50 krónur, fyri hvønn skotnan kóp. Hetta hjálpti, og síðan hava ikki verið teir stóru trupulleikarnir við kópi.

Her kann verða skoytt uppí, at einaferð sigldi pápi á land við báti sínum Helena. Hann var saman við mammu á veg úr Havn inn á Sund. Tað var mjørki, og tá tey komu til skergarðin, sum er inn frá norðara enda á Hoyvíkshólmi, sigla tey á eitt sker, og báturin stóð fastur. Tíbetur hevði hann lítla bát við. Tey fara bæði í hann og rógva inn til Hoyvíkar. Men tá pápi seinni fer at hyggja eftir Helenu, er hon flotnað aftur, og eingin skaði er hendur.

## Bygdu Tjørnunes

Men í 1963 bygdi eg motorbát í Ålesund saman við George Jacobsen. Vit høvdu hann saman eini fýra ár, tá eg keypti hansara part.

Báturin var liðugur tað heystið. Vit fóru úr Ålesund ein fríggjadag. So sigur George:

»Hevur tú hug at fara út í kvøld ein fríggjadag?« Tað var gott veður. Eg var nakað ókunnugur, so tað ráddi um at sigla, meðan tað var ljóst, so tað var at sleppa sær av stað fríggjadag ella ikki. Vit komu heim í øllum góðum í besta veðri. Men spurningurin er, hvussu tað hevði verið at bíða til leygardag, tí tað bleiv so ringt veður í hølunum á okkum, at tað hevði blivið ein ringur túrur heim, um vit bíðaðu.

Báturin var 14 tons, hann varð seinni forlongdur, so afturdekkið gjørdist so stórt. Tískil gjørdist hann 20 tons. Vit róðu við kalvalínu um summarið. Men tá fór kalvin at minka. Tað gjørdist ov lítið bert við kalvanum, so fóru vit at rógva við toskalínu um veturin. Tað gekk eisini væl.

Tey síðstu árini róðu vit bara út frá Sørvági, har báturin eisini lá. Út frá Mykinesi var so sera gott fiskipláss. Vit royndu bara um Mykines við toskalínu. Fiskaríið var so javnt. Tað lá um 300 pund uppá stampin. Hvør stampur var 5 stykkir ella 300 favnar. Hetta vildi í dag verið roknað fyri at vera framúr gott fiskarí.

Vit brúktu tó ikki so nógva línu. Vit høvdu bara einar tjúgu stampar hvønn túrin. Hetta merkti, at vit gjørdu styttri túrar, men vit kundu so leggja meira til. Vit vóru tríggir mans við, minni kundi tað ikki vera. Ein skuldi stýra, ein draga og ein standa við rulluna. Línan varð egnd í landi, vit vóru so hepnir at fáa ein sera góðan landformann. Hann hevði annars ein bát, sum hann róði út við í Grønlandi fyrr, nú róði hann út í

➜